# Borgarin betri tænastu frá Almannastovuni

**- Øll viðskiftafólk, sum koma í samband við Almannastovuna, skulu føla, at málsviðgerðin er góð, á einum fakligum høgum stigi og at hon er vinarlig, uttan mun til, um umsóknin hjá viðkomandi verður játtað ella ikki, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni**

ALMANNASTOVAN
*Turið Kjølbro*

Almannastovan er ein týðandi stovnur fyri stóran part av Føroya fólki, og er tann almenni stovnurin, sum fólk eru oftast í sambandi við frá vøggu til grøv.

- Fremsta uppgávan hjá stovninum er, at brúkararnir og viðskiftafólkini, fakbólkar og politisku myndugleikarnir hava álit á stovnin. Opinleiki og gjøgnumskygni í allari umsitingini er sera umráðandi, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni.

Stovnurin er farin undir sera umfatandi bygnaðarbroytingar. Ístaðin fyri at hava serkunnleikan miðsavnaðan undir ymsum deildum, ið er býttur upp eftir arbeiðsøkjum, skulu allar deildir á stovninum hava sama serkunnleika og vitan um øll øki. Økisdeildirnar kring landið skulu vegleiða og ráðgeva innan so at siga øll øki, og kunningin frá øllum deildum og økisdeildum skal verða eins yvir alt landið. Fyri at hetta skal eydnast, skulu øll starvsfólkini á stovninum, uttan mun til starvsaldur og útbúgving, undir eftirútbúgving sum liður í førleikamenning. Í hesum sambandi fáa serfrøðingarnir á stovninum eftirútbúgving í servitan.

- Endamálið við hesum er, at øll starvsfólkini fáa sama kunnleika og fatan um okkara lógarverk. Viðskiftafólkið skal fáa tað sama at vita, uttan mun til, hvar viðkomandi vendir sær til. Hetta eru ógvuliga stór krøv til okkara starvsfólk, men tey eru neyðug, um viðgerðin skal verða betri. Starvsfólkini á stovninum skulu kunna viðskiftafólk rætt, eins og nøktandi, og møta viðskiftafólki vinarliga. Øll viðskiftafólk, sum koma í samband við Almannastovuna, skulu føla, at málsviðgerðin hevur verið góð, á einum fakligum høgum stigi og at hon hevur verið vinarlig, uttan mun til, um umsóknin hjá viðkomandi verður játtað ella ikki, sigur Petra Joensen.

Grundskeiðið byrjar hálvan august og er í ein mánaða. Víðkaða skeiðið verður seinni í heyst. Tá ið hetta árið er lokið, skulu allar bygnaðarbroytingarnar vera framdar.

## Styrkja felagsfatanina

Grundin til, at henda umfatandi eftirútbúgvingin verður framd, er ikki, at starvsfólkini á stovninum kenna lógarverkið ov illa, sigur stjórin á Almannastovuni.

- Tað er umráðandi at menna felagsfatanina av okkara lógarverki og at tryggja okkum, at øll starvsfólkini kenna lógarverkið. Tað er ikki nóg mikið, at vit halda, at øll kenna lógargrundarlagið. Fáa vit tær afturmeldingar, eitt nú frá fjølmiðlunum, at viðgerðin og viðferðin eru tilvildarlig, má eg sum stjóri kanna neyvt eftir innanhýsis, hví fólk hava hesa fatan, sigur Petra Joensen.

Hvørt almenningurin hevur álit á Almannastovuni og er nøgdur við ta viðgerð, tey fáa frá stovninum, ella ikki, skulu vit ikki taka dagar ímillum. Men vit kunnu vísa á dømi, har fólk hava fílst á viðferðina og viðgerðina, tey hava fingið frá málsviðgerðarum á Almannastovuni. Eitt nú hevur verið funnist at, at kunningin hevur verið ónøktandi og ymisk. Hesar atfinningar eru tiknar til eftirtektar. Somuleiðis hevur Løgtingsins umboðsmaður givið Almannastovuni átalu fyri drúgva viðgerð.

Leiðslan á Almannastovuni hevur gjørt av, at kunningin, sum fer út av stovninum, skal raðfestast hægri og gerast betur í framtíðini.

- Leiðsluskrivstovan, sum verður sett á stovn, fer at taka sær av hesum, soleiðis, at dygdin og upplýsingarnir í kunningini eru á høgum stigi. Hetta skal sjálvsagt gerast í samsvari og samstarvi við serkunnleikan á deildunum. Øll kunning verður eftir einum væl gjøgnumhugsaðum leisti eftir einum serligum sniði, har dygdin er í hásæti. Hetta verður ein spennandi avbjóðing til okkara. Vit kunnu seta okkum sjálvum spurningin, um vit tosa eitt mál, sum fólk skilja ella ikki. Málið í sjálvum sær er, at kunningin ikki bert skal verða nøktandi orðað, men eisini innihalda tær upplýsingar brúkarin hevur brúk fyri, sigur Petra Joensen.



- Fáa vit at vita, at viðgerðin og viðferðin eru tilvildarlig, má eg sum stjóri kanna neyvt eftir innanhýsis, hví fólk hava hesa fatan, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni.
*Mynd: Egil Gullbrandsson Olsen*

## Datagrundarlag

Almannastovan arbeiðir við at gera eitt stórt datagrundarlag, soleiðis, at stovnurin altíð nágreiniliga veit, hvussu nógvar umsóknirnar eru til tað ymiska, nær tær koma, hvar trýstið er størst og hvar bíðitíðin er longst.

- Eru hesi viðurskiftini greið, vita vit, hvørji øki á stovninum skulu styrkjast og betrast. Leiðslan hevur arbeitt við visjónum og ætlanum fyri stovnin og í heyst seta vit í verk virkisætlanir fyri ymsu økini og toymini kring landið. Tað er sera umráðandi, at leiðsla og starvsfólk eru greið yvir, hvørja tænastu vit geva og hvørja vit eiga at geva, sigur Petra Joensen.

Stjórin á Almannastovuni metir, at stovnurin megnar stóru avbjóðingina, sum umfatandi bygnaðarbroytingar er, og at stovnurin hevur starvsfólkaorkuna til tess. Tó hevur stovnurin eina umsókn um størri játtan í komandi fíggjarlóg.




*Endamálið við bygnaðarbroytingunum á Almannastovuni er koma skjótari út til borgaran við eini betri og nøktandi tænastu. Mynd:*

# Nýtt, vakurt og lærurikt Føroya-putlispæl

**Nýtt Føroya-putlispæl er komið í bóka- og aðrar sølubúðir kring landið**

ÚTGÁVA

Tað er listamaðurin Edward Fuglø, sum hevur teknað kortið, sum ikki bara vísir oyggjar, bygdir, firðir og sund, men umframt er prýtt við tí, ið er í Føroyum.

Kortið er randað av blómum og grøsum í erva og tara og øðrum av havsins botni í neðra. Kring oyggjarnar í erva sveimar fuglur, og í neðra svimur fiskur, kópur og hvalur. Kortið er tí ikki bara eitt putlispæl við 50 puntum, sum barnið kann hugna sær við at leggja. Størstu nyttuna fáa børn og vaksin saman burtur úr: tey smáu hava helst ilt við at skilja ta landafrøðiliga, men tey kunnu læra at kenna fugl, fisk, hval og gróður á landi og í sjógvi. Størri børn kunnu umframt hetta læra seg oyggja- og bygdanøvn.

Sjálvandi er Føroya-putlispælið eisini avbera væl egnað at geva útlendingum, sum eitt ítøkiligt minni um Føroyar.

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur nýggja Føroya-putlispælið út. Tað kostar kr. 65 + mvg.






# 300 fólk heilsaðu FJM-monnunum




*Fritleif Olsen saman við hinum trimum eigarunum í FJM.*
*Mynd: Jens Christian Vang.*

**Nú FJM bæði hevur gamla bygningin við Fjøruvegin í Runavík og nýggja bygningin á Rytuvíkarhálsi, fer felagið at taka sær av eitt nú viðlíkahaldi í Runavík, meðan nýgerð og langsiktaðu arbeiðini verða gjørd í hølunum á Rytuvíkarhálsi.**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*

Næstsíðsta fríggjadag bjóðaði maskinverkstaðurin, FJM, til móttøku í nýggja bygninginum hjá felagnum á Rytuvíkarhálsi.

Fyrr í summar seldi Frithleif Olsen, sum átti FJM, 3/4 av felagnum til tríggjar verandi og fyrrverandi starvsfelagar; hesir eru Jóhan Henrik Olsen, sum hevur starvast hjá Frithleifi síðan byrjanina, Petur Jacob Petersen, sum hevur starvast hjá FJM í fleiri ár og Arni Carlsen, sum eisini hevur starvast hjá felagnum í nøkur ár.



*Nýggi bygningurin hjá FJM á Rytuvíkarhálsi.*
*Mynd: Jens Christian Vang.*

Hesir fýra eiga nú fýra líka stórar partar av felagnum, FJM.

## 300 fólk

FJM lýsti í bløðunum og bjóðaði almenninginum at síggja bygningin og hitta eigararnar. Brøv vórðu send virkjum, reiðaríum og øðrum, sum felagið samstarvar við.

Hendan dagin yviri á Rytuvíkarhálsi vóru eini 300 fólk samlaði til at heilsa uppá Frithleif Olsen og hinar tríggjar eigararnar av felagnum.

Hýrurin var góður, og vertirnir bjóðaðu kaffi, te og smurt breyð.

Birgir Nónsgjógv og Jónsvein Olsen undirhildu við tónleiki og sangi.

## Flyta so við og við

Nú FJM bæði hevur gamla bygningin við Fjøruvegin í Runavík og nýggja bygningin á Rytuvíkarhálsi, fer felagið at taka sær av eitt nú viðlíkahaldi í bygninginum í Runavík, meðan nýgerð og langsiktaðu arbeiðini verða gjørd í nýggju hølunum.

Umframt bygningin í Runavík, hevur FJM leigað ein part av kjallaranum í bygninginum á Glyvrum, har Bónus húsast. Her stóðu nøkur amboð, sum nú eru flutt yvir í bygningin á Rytuvíkarhálsi, har virksemið so spakuliga er komið í gongd.

FJM tekur sær av viðlíkahaldi, nýgerð og sølu.



*Eini 300 fólk nýttu høvi at heilsa Fritleifi, Jóhan Henriki, Petur Jacobi og Arna næstsíðsta fríggjadag.*
*Mynd: Jens Christian Vang.*